## Suni heldur fram

Suni Vinther heldur fram sum formaður í Reyða Krossi eftir aðalfundin í gjár.

Nevndin, sum varð vald á aðalfundinum í gjár, skipaði eftir fundin við Suna Vinther sum formanni, Onnu Dahl-Olsen sum næstformanni og skrivara, Líggjasi Joensen sum kassameistara og Atla Godtfred og Kaju Nielsen sum nevndarlimum.

Varalimir hjá nevndini eru Per N. Persson og Mads W. Lützen.

## Bókakafé á Hafnia Lounge

Mikukvøldið 21. mars kl. 20.00 verður bókacafé í Havn í Hafnia Lounge.

Sigga-Maria Hjalmarsdóttir Højgaard lesur yrkingar burtur úr savninum: Orðini hava tagnarskyldu. Marna Jacobsen: Málburðurin í Stjórnarskipanarlógini – alt ov kallmansligur? Finnur Johansen: Traðkaðu fólkinum slóð.

Hotel Hafnia og Kunningarstova siga, at øll er hjartaliga vælkomin.

Løgreglan gjørt húsarannsókn:

# 39 ára gamal skuldsettur fyri barnaporno

**Løgreglan hevur skuldsett ein mann úr Vágum fyri at liggja inni við barnaporno**

BARNAPORNO
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Útbreiðsla av barnaporno á alnótini er almikil. Danska løgreglan hevur eina serliga deild at hava eyguni eftir hesum. Og eftir boðum frá hesi IT-deildini gjørdi kriminalløgreglan í Føroyum húsarannsókn í Vágunum fríggjadagin, har teir løgdu hald á harðdiskar, sum innihildu barnaporno*

Undir eini húsarannsókn vesturi í Vágunum fríggjadagin avdúkaði løgreglan, at ein 39-ára gamal familjumaður hevði tikið niður barnaporno av alnótini.

Kriminalløgreglan í Føroyum hevði fingið boð frá IT-deildini hjá donsku ríkisløgregluni um hetta førið av barnaporno í Føroyum og reageraði hareftir.

Bergleif Brimvík, leiðari av kriminaldeildini hjá føroysku løgregluni, váttar, at húsarannsókn er gjørd heima hjá einum 39-ára gomlum familjumanni og á einum arbeiðsplássi, har hald er lagt á harðdiskar til tess at staðfesta, um hesir innihalda barnaporno.

- Maðurin er avhoyrdur og skuldsettur í málinum og síðani latin leysur aftur, sigur Bergleif Brimvík, sum tó ikki vil siga, hvar í Føroyum henda húsarannsókn er farin fram.

Sosialurin hevur tó frá øðrum álítandi keldum fingið at vita, at húsarannsóknin er framd vesturi í Vágunum.

Bergleif Brimvík váttar, at tað er próvfast, at viðkomandi hevur tikið myndir av barnaporno niður av alnótini, og at málið nú er latið donsku løgregluni til víðari kanningar.

Leiðarin á kriminaldeildini í Føroyum sigur, at hetta er fyrstu ferð, at føroyska løgreglan fær boð frá donsku IT-deildini um slíkt lógarbrot. Henda deildin hjá donsku løgregluni fylgir við á alnótini og avdúkar tilfelli av eitt nú barnaporno.

39-ára gamli vágamaðurin er skuldsettur eftir §235, stk. 2, ið sigur, at:

»den som besidder eller mod vederlag gør sig bekendt med fotografier, film eller lignende af børn, der har samleje eller anden kønslig omgængelse end samleje, har kønslig omgang med dyr eller anvender genstande på groft utugtig måde, straffes med bøde eller under skærpende omstændigheder med hæfte eller fængsel indtil 6 måneder.«

# Góðar vónir fyri komandi árið

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin*

Í ársfrágreiðingini hevur nevndin góðar vónir fyri árið í ár. Roknað verður soleiðis við nettorentu- og tænastuinntøkum á umleið 290 til 310 mió. kr. Hetta bjartskygni stavar í høvuðsheitinum frá einum væntaðum vøkstri í útlánunum upp á 1 mia. kr.

Eisini í økta handlinum av virðisbrøvum ætlar bankin sær lut í. Kunnleikin hjá føroyingum til íløgur í virðisbrøv er munandi øktur seinastu árini, og Føroya Banki fer at leggja stóran dent á at ráðgeva um keyp og sølu av hesum.

Ein serlig »partakonto« er sett á stovn til kundar bankans, har teir kunnu seta pening á til heili 6,5% í rentu, um kundarnir velja at keypa partabrøv fyri peningin. Hetta er gjørt fyri at skunda undir áhugan hjá kundunum at seta pening í virðisbrøv.

Føroya Banki hevur seinasta árið sett fleiri fólk í starv og ætlar eisini í ár at økja um starvsfólkatalið. Hetta verður mett neyðugt fyri at fremja vakstrarætlan bankans og fyri at menna samskiftið við kundarnar.

Nevndin roknar við einum úrsliti fyri skatt fyri 2007 upp á 120 til 140 mió. kr.



*Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður, Eyðun á Rógvi, formaður í Fíggingargrunninum frá 1992, og Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka. Allir hava góðar vónir fyri komandi ári*